

Frítíðarbilurin BMW X5 verður eisini uppbygdur til limousinu í USA



Ein av mest vanligu limousinunum eru amerikonsku Ford Lincoln. Her eru tveir av slagnum





Amerikonsku Hummer H2, kendu off-roadararnir frá Flógvakrígnum, verða eisini gjørdir sum limousinur

Mynd: Magnus Gunnarsson



Tað er ikki óvanligt at nýta serligar bilar, tá okkurt heilt serligt er á vási, sum t.d. brúðarvígslur. Her er ein Ford Lincoln brúðarbilur íBirmingham

Mynd: Magnus Gunnarsson

# Microcar - ein tann minsti

Nú vit skriva um langar luksuslimousinur, kunnu vit eisini nevna onkran bil í hinum endanum á skalainum sum t.d. Microcar, ið er ein franskur minibilur við 400 cc motori

Microcar er umleið 2 metrar langur og er væl minni en t.d. Smart Fortwo, ið bert er 2,5 m langur. Microcar verður drivin av eini reim millum girkassan og motorin eins og DAF-persónbilarnir, ið fyrr vórðu gjørdir í Hálandi. Motorurin er framman, og bilurin við tveimum sitiplássum hevur lutfallsliga stórt viðførisrúm.







Microcar er ein franskur minibilur við 400 cc motori og er ein av minstu bilum, ið verður framleiddur

Myndir: Magnus Gunnarsson